DAGSINS MEINING

Áhugavert alternativ

Samgongan fer at viðgera spurningin um at lækka oljuavgjaldið. Tað er Marjus Dam, tingmaður úr Vágum, sum nú vil hava samgonguna at lækka oljuavgjaldið. Tingmaðurin heldur, at tað hevur so stóran týdning, at oljuavgjaldið lækkar, at eftir hansara tykki hevði tað verið betur at bíða í eitt ár við fráboðaða skattalættanum, um so var, at oljuavgjaldið kundi verið heilt avtikið ístaðin. Lat tað verða sagt alt fyri eitt, at hetta er eitt sera áhugavert uppskot, og hava vit áður í hesum teigi mælt samgonguni til tað sama.

Samgonguflokkarnir ætla at koma við einum skattalætta, sum ikki er serstakliga vældámdur í almenninginum sum heild. Orsøkin er sjálvsagt, at hesin skattalætti mest gagnar teimum høgu inntøkunum. Hinvegin vildi ein lækking av oljugjaldinum komið øllum væl við - ikki mist láginntøkubólkum og pensionistum. Oljugjaldið er ikki sørt ómoralskt. Sum vit áður hava víst á her, er upprunaliga endamálið við hesum avgjaldi langt síðan burtur. Hetta hevði nakað við oljukreppuna í 1973 at gera. Nógv vatn er síðan runnið í áir, og tað er sera torført at finna nakra haldgóða grund fyri hesum avgjaldi. Hartil kemur, at soleiðis sum avgjaldið er skipað, fær landskassin meira og meira inn við hækkandi oljuprísunum. Sostatt vendir hetta avgjaldið tunga endanum niðureftir.

Tað er sjálvsagt eingin løtt avgerð at ganga frá lyftinum um skattalætta, so vit siga ongan ringan fyri ikki at gera tað, hóast ein loysn við oljugjaldinum er eitt upplagt og nógv betri alternativ. Hinvegin eru fortreytirnar fyri tí lovaða skattalættanum heilt nógv broyttar, síðan hetta lyftið í valstríðsins lættsinni varð givið. Tað er lítið at ivast í, at fólk høvdu skilt og fyrigivið, um tey fingið nakað annað og munabetri í staðin. Tískil er uppskotið hjá Vágatingmanninum eitt sera áhugavert uppskot, sum samgongan átti at viðgjørt í størsta álvara.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Verkstað til tey, sum hava sálarliga sjúku

Halla Samuelsen
valevni hjá Javnaðarflokkinum

Einki verkstað er til tey, sum hava sálarliga sjúku, og er stórur tørvur á einum slíkum stað. Høvdu vit havt eitt verkstað til tey, kundu fleiri havt eitt arbeiði at farið upp til hvønn morgun. Tey høvdu fingið meira innihald í lívinum, sosiala samveru og eitt virðiligt lív. Fólk flest halda, at tað er ein sjálvfylgja at hava eitt arbeiði at fara upp til hvønn dag. Men soleiðis er tað ikki hjá fleiri av teimum, sum hava sálarliga sjúku.

Javnaðarflokkurin er greiður yvir støðuna, og vit ynskja at gera nakað við hetta, nevnliga at útvega hesum fólkum eitt verkstað.

Fái eg tín stuðul til býráðsvalið 9. nov., ert tú við til at gera umstøðurnar hjá teimum, sum hava sálarliga sjúku, betri. So skal eg gera mítt til, at hetta mál verður loyst skjótt og væl.

Hvat er ein góð kommuna

Meta C. Palle

Fyri mær er ein góð kommuna eitt stað, har borgarar í øllum aldri skulu kenna seg tryggar, eisini á heilsuøkinum. Tí skal eisini arbeiðast fyri at talið á kommunulæknum er nóg stórt í mun til fólkatalið.

Vit vita øll, at tað er sunt at brúka kroppin. Børnini skuldu tí fingið størri møguleikar at súkla til og úr skúlanum. Hetta kann gerast við at gera fleiri súklubreytir.

Tey eldru eiga øll at hava møguleika at kunna flyta í minni íbuðir- møguliga vardar.

Ung í aldrinum 14 - 18 ár, sum hava hug at fara í býin um vikuskiftini, eiga at hava eitt dansistað, ið er undir eftirliti av voksnum fólki.

Kommunan er nú blivin so stór, at tørvur eisini er á fleiri herbergum til fólk, ið onga aðrastaðir hava at fara.

Hetta vóru nøkur av málunum, eg kundi hugsa mær at arbeitt við.

Stadion í Havn

Anna Maria Persson
Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð

Havnin eigur at hava eitt stadion til frælsan ítrótt. Býráðið hevur áður sett pening av til stadion, men av ymsum orsøkum er ætlanin enn ikki vorðin veruleiki.

Innan frælsan ítrótt hevur serliga renning verið í stórari menning seinastu árini. Vit síggja, hvussu mong í øllum aldri luttaka í teimum kappingum og tiltøkum, sum verða gjørd. Við eini rennibreyt verða møguleikarnir betri hjá fólki her í býnum, og serliga fyri børnini gerast umstøðurnar munandi tryggari, tá tey sleppa undan at renna úti í tí nógvu ferðsluni.

Við einum stadion til frælsan ítrótt fáa eisini skúlarnir í kommununi góðar møguleikar at undirvísa í hesi grundleggjandi ítróttargrein, og gjørligt verður at taka uppaftur skúlaítróttarkappinganar í frælsum ítrótti, sum vóru ser væl umtóktar fyri nøkrum árum síðani. Í kjakinum, sum var, tá ætlanin um rennibreyt rundanum Tórsvøll varð broytt, stuðlaðu umboð fyri skúlarnar í Havn ætlanunum um at fáa rennibreyt.

Eisini fyri elituítróttin er neyðugt at fáa eitt stadion til frælsan ítrótt. Umstøðurnar at venja renning, kast og lop eru nógv verri her hjá okkum enn í grannalondunum. Allar oyggjarnar, sum eru við í Oyggjaleikunum, hava uttan undantak í hvussu er eitt vælvirkandi stadion. Hóast hetta, so eru dømi um føroyingar, sum hava vant her heima og hava fingið góð úrslit í rennikappingum bæði her og uttanlands. Verða umstøðurnar at venja betri, kunnu vit rokna við enn betri úrslitum. Skulu føroyingar av álvara klára seg væl í altjóða kappingum, so er mest líkt til, at tað verður í einstaklingaítrótti.

Næstu Oyggjaleikir verða komandi summmar í Hetlandi. Skulu vit hava Oyggjaleikirnar aftur í Føroyum verður kravið: Stadion í Havn.

Eitt stadion í Havn er eisini eitt lið í ætlaða heilsupolitikkinum í landinum. Allir borgarar, eldri sum yngri, kunnu fáa gleði og gagn av tí.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfar. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Barnafrádrátturin verður 5.000 kr.

Bjarti Mohr
Býráðslimur
Fólkaflokkurin X við A

Samgongan í Tórshavnar Býráð hevur sett barnafrádráttin upp til kr. 5000 fyri komandi fíggjarár 2005. Eitt uppskot frá minnilutanum um at geva systkinafrádrátt í samband við barnaansingina var ikki samtykt. Uppskoti um systkinafrádrátt er gott og væl meint, men tað hevur ein ójavna við sær og er ringt at umsita. Ein størri barnafrádráttur kemur hinvegin øllum barnafamiljum til góðar og hann er galdandi fyri børn og hálvvaksin heilt upp til 18 ár. Tað man kosta líka nógv at hava tannáringar við hús sum at hava børn í barnagarði.

Ein størri barnafrádráttur kemur altíð teimum lægst løntu til góðar, ímeðan ein systkinafrádráttur ikki altíð ger tað.

Við hesum 5.000 kr. pr. barn hevur Tórshavnar Kommuna ein tann hægsta barnafrádráttin í landinum. Fólkaflokkurin hevur í sitandi samgongu verið við til at loyst barnaansingina. Vit koma framhaldandi at virka fyri at barnafamiljur fáa so góðar umstøður sum gjørligt og at øll fáa somu tilboð her í kommununi.

Fólkaflokkurin – ein virkin flokkur.

Nú verða suðringar aftur gíslar

Alvin Joensen
valevni fyri Javnaðarflokkin í Vági

Tað er ikki bert Ingeborg sum kann avbyrgja suðringar. Landsins myndugleikar eru eisini ein stór hóttan. Smyril má undir ongun umstøðum seljast tey fyrstu 2 árini, eftir at nýggi Smyril er komin.

Barnasjúkurnar kunnu verða nógvar við tí nýggja skipinum, og eisini skal hann til eftirlit eftir stuttari tíð. So tað fyrstu tíðina verða vit noyddir at hava eitt avloysara skip um Suðuroyar-leiðin skal kunna fungera.

Í hesum tíðarskeiði kundi han m. a. verði brúktur til at flyta ferskan fisk av landinum tá hann ikki verður brúktur til avloysaraskip. Tað hevði víst, at Suðuroyggin eisini er ein partur av landinum.

Tað kan ikki verða so umráðandi at sleppa av við hetta vælsignilsi, sum hevur verið lívsæðrin hjá Suðuroyingum í mong mong ár.

Man má verða glaður, um tað man hevur og fróast um tað sum kemur aftrat.

Betur er bøtandi hond enn spillandi tunga

Jan Christiansen
borarstjóri

Nú býráðsvalið nærkast, verða alt fleiri og fleiri valgreinar í bløðunum. Tey nógvu valevnini bjóða seg fram, við at lova eittvørt, um tey ella teirra flokkur verður valdur.

Men tað sker ein í eyguni, at býráðslimirnir í Tórshavn, ið umboða minnilutan, eru sera negativir og mest som bert finnast at. Eg hadi, at tað má vera maktarloysi, tí veljarin ynskir vælsaktans positivar og konstruktivar býráðslimir, heldur enn nakrar, ið minna um grátandi barnakonur.

Ferðin hevur verið stór, men..

Nógv er gjørt seinatu árini í Tórshavnar Kommunu. Onkur heldur at ferðin hevur verið í so stór, men tá hugsa verður um, at tað, ið gjørt er, er goldið, og haraftur at øll skuldin hjá kommununi er fyribeind, so ger tað minni um ferðin er í meira lagi.

Fyri at tríva í nakað av tí í gjørt er, kann nevnast:

- Skuldin niðurgoldin
- Barnaansing til øll børn
- Hægsta barnafrádrátt í Landinum

- Fleiri heim til tey gomlu
- Útstykkingar til 590 bústaðir
- 34 nýggj vinnustykki
- 2 nýggjar ítróttarhøllir
- Skateboard park
- 4 smærri graslíkisvøllir
- Rein Havnarvág
- Nýtt endurnýtslupláss
- Fleiri vegagerðir
- Fleiri rundkoyringar
- 180 nýggj parkeringspláss
- Bátahylurin á Signabø
- Bátahylurin á Argjum
- Skúlabygging og ábøtur

Ein kundi nevnt so nógv annað, ið er gjørt í hesum valskeiði, so hví ikki glaðast um tað, ið gjørt er, heldur enn at grenja av berum máttloysi.

Frá hóttan til møguleika

Skúlin, granskingin og fiskivinnan í fíggjarlógaruppskotinum 2005.

Heidi Petersen
løgtingskvinna

Til eina fíggjarlóg hoyrir eisini ein yvirskipaður politikkur, ein politisk raðfesting og nøkur innsatsøki, sum tingið kann viðgera og siga sína hugsan um, so landsins leiðsla veit, hvat hon hevur at halda seg til í komandi tíðum.

Í so máta er onki at hóma í hesum fíggjarlógaruppskotið fyri 2005. Mest leysir endar og ymisk signal úr ymsu stýrunum. Her vanta visiónirnar, her vanta grundgevingarnar og her vanta tey politisku mál, ætlanin er at røkka.

Fólkaskúlin

Fólkaskúlin hevur fingið játtan um fleiri pengar í komandi ári, og er tað at fróast um, men vit vanta framvegis eitt orðaskifti um innihaldið í fólkaskúlanum. Hvørji krøv seta vit, hvat vilja vit við fólkaskúlanum og hvussu kunnu vit alla tíðina menna skúlan, soleiðis at hann er tíðarhóskandi?

Kundi hugsað mær at spurt landsstýrismannin í mentamálum eitt nú, hvussu nógvar fleiri undirvísingartímar fáa vit til næmingar við at økja játtanina til fólkaskúlan við hesum 7 mió. kr.?

Nær sleppa vit at tosa um innihaldið í skúlanum og ikki bert um kr. og oyru?

Mentunarnevndin var á vitjan í Álandi í síðstu viku. Vitjaði m.a. ein vanligan fólkaskúla í Mariehamn við 260 næmingum frá 1. til 6. flokk. Pedagogiska grundarlagið undir allari undirvísingini var tann vitanin, sum heilagranskarar hava víst á, at "Hippocampus" - tann parturin av heilanum, sum stendur fyri allari vitanini - er stýrdur av lysti ella hugi. Tað er væl ikki so ókent, at so er, men í Álendska skúlanum hava tey til fulnar tikið avleiðingarnar av hesi vitan og hava skipað alla undirvising við hesum fyri eyga.

Á fíggjarlógini eru avsettar stórar upphæddir til íløgur í skúlar kring landið. Hetta er í góðum samsvari við tað ætlan, undanfarna samgonga stakk út í kortið, og eri eg sera fegin um, at hildið verður fram eftir sama leisti: Fiskivinnuskúlin í Vestmanna og Tekniski skúli í Klaksvík við 3 mió., skúladepilin í Markangili við 6 mió. og Miðnámsskúlin í Vági við 23 mió. Men her restar í. Hvar er Lista- og ítróttarskúlin í Sandoy vorðin av? Ella er hetta ein beinleiðis ábending um tað visiónsloysi, henda samgonga stendur fyri? Ber tað í veruliga til at útihýsa eini heilari oyggj frá sam-felags-menningini?

Eisini her er tørvur á einum orðaskifti um innihald á hesum skúlum. Men gott í teg, landsstýrismaðurin, lat ikki sjónarringin vera so trongan, at hann bert vendir í ein land-

Framhald á síðu 13

Heildagsskúli

Katrin Dahl Jakobsen
Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð

Hóast vit við lóggávu hava álagt okkum sjálvum, at skúlin skal vera fyri øll, og tað málið skulu vit halda fast um, so vita vit, at veruleikin er ein annar. Tað eru næmingar, sum lítið og einki fáa burtur úr skúlagongdini, og tað hóast teir eru vanliga gávaðir. Sum er, so røkka tilboðini í fólkaskúlanum ikki hesum næmingum, sum ofta hava innlæringar- og atferðartrupulleikar. Orsøkirnar kunnu vera so mangar, men stava ofta frá nervandi hendingum í lívinum. Fyri teimum gerst verðin bara so mikið fløkt, at vanligar avbjóðingar, sum tað at vera í einum felagsskapi, er sera trupult, og ofta eru tey til ampa fyri undirvísingina og flokkin tey ganga í. Hesi børnini mugu vit taka okkum av, soleiðis at eisini tey fáa hóskiligar og mennandi avbjóðingar, sum kunnu gera tey før fyri at vera í valigum skúlaflokki.

Dømi eru um, at man sum neyðloysn hevur sent hesi børnini av landinum á skúla ella stovn. Men tað er ov lætt sloppið og ósømiligt bert at betala hesi børnini burtur úr eygsjón og feia trupulleikan undir teppið, heldur enn at samla, skipa og styrkja tann førleika vit sjálvi hava.

Nú hava røddir verið frammi um, at seta á stovn ein heildagskúla í Tórshavnar kommunu. Slíkir skúlar eru vanligir aðrastaðni og fevna um frálæru, frítíð og viðgerð í eina tíð, alt eftir tørvi hjá tí einstaka. Endamálið er sjálvsagt, at næmingarnir verða styrktir soleiðis, at tey aftur kunnu gerast partur av vanliga fólkaskúlanum. Hugskotið er áhugavert, men krevur, at tann múrur, sum í dag er millum almanna- og skúlaverk verður brotin niður, tá bæði hesi verkini koma at hava sín leiklut í slíkari skipan. Ansast má eisini eftir, at hetta ikki verður eitt hent avreiðingarstað hjá skúlaleiðslum av atferðartruplum næmingum, men eitt stað, sum skúli og foreldur í felag velja, tí einki annað bar til. Hóast slík loysn verður vald, so eiga leiðslurnar at vita, at tær framhaldandi "eiga" næmingin. Tað er umráðandi, at vit ikki aftur fara at gera ein B-skúla, sum fer at vaksa seg stóran, tí ov lætt er at senda næmingar frá sær. Tað er hóast alt í vanliga fólkaskúlanum, at størsta orkan skal leggjast í, at brynja okkara børn til samfelagið. Eisini hesi børnini. Javnaðarflokkurin vil vera við til at skipa skúlaviðurskiftini í kommununi soleiðis, at eingin dettur niður ímillum.

Gott Vín og øl til okkara eldru

Johan Mortensen
Valevni Tjóðveldisflokksins til Býráðsvalið

"Vín gleðir mannin" sigur Prædikarin " Eitt gott glas av reyðvíni ella ein nýtappaður Restorffs ølur er gott fyri heilsuna og eg vildi unt øllum okkara eldru á Ellisheimum og stovnum í Havn eitt gott glas aftur við døgurðanum hvørt kvøld, um fólk væl at merkja hava hug til tess. Vín og øl við máta skapa hugna og trivna og sjálvandi skal Býráðið gjalda fyri løgin, tað er tað minsta. Kanningar vísa at fólk sum moderat njóta eitt glas liva longri enn avhaldsfólk.